FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 1. oktobur 2021
J. nr.: 21/18839
Viðgjørt: AE

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-040/2021 frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinnu, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen, um byrgingina um Haraldsund

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at nýta ein part av grótinum úr tunlunum norður um Fjall til at gera byrgingina um Haraldssund lidna?

2. Nær er ætlanin at gera byrgingina lidna?

Svar:
Byrgingin um Haraldsund er 350 metrar long og 20 metrar breið. Byrgingin er ongantíð gjørd liðug. Landsverk fekk í 2008 játtan til at gera projekt fyri liðugtgerð av byrgingini, og var arbeiðið tá klárt at bjóða út. Verkætlanin verður mett til at kosta eini 32 mió kr.

Við verkætlanini verður byrgingin dagførd, soleiði hon verður tíðarhóskandi og lýkur dagsins krøv til eina slíka farleið.

Byrgingin verður eftir ætlan umbygd nakað, og verður stórur partur av verandi verklagi partur av endaligu loysnini. Broytingin í mun til verandi byrging er, at vegurin verður lagdur soleiðis at hann verður ein nattúrligur partur av vegunum báðumegin.

Tað er ikki tørvur at brúka tunnilsgrót til projektið sum ætlanin er at gera, tí ætlanin er at endurnýta tilfarið í verandi byrging til nýggju byrgingina, og sambært projektinum er einans tørvur á heilt stórum dekkgróti afturat tilfarinum, sum longu er í byrgingini. Hetta større grótið fæst ikki úr tunnilsgerð, og má tískil spreingjast í einum grótbrotið.

Eftir langtíðarløguætlanin, verður byrgingin um Haraldsund gjørd í 2027-2028.

Tinganes, 1. oktobur 2021

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum